

The United States of America

The Commissioner of Patents and Trademarks

Has received an application for a patent for a new and useful invention. The title and description of the invention are enclosed. The requirements of law have been complied with, and it has been determined that a patent on the invention shall be granted under the law.

Therefore, this

United States Patent

Grants to the person or persons having title to this patent the right to exclude others from making, using or selling the invention throughout the United States of America for the term of seventeen years from the date of this patent, subject to the payment of maintenance fees as provided by law.

United States Patent [19]
Sørensen

[54] LONG LINE FOR USE IN LONG LINE FISHING

[75] Inventor: Trondur J. Sørensen, [illegible]

[21] Appl. No.: 258,269

[22] Filed: Aug. 30, 1988

[30] Foreign Application Priority Data

[51] Int. Cl.[4] A01K 91/06

[52] U.S. Cl. [illegible]

[58] Field of Search [illegible]

[56] References Cited
U.S. PATENT DOCUMENTS

[11] Patent Number: 4,829,696

[45] Date of Patent: May 16, 1989

[57] ABSTRACT

Soleiðis sær amerikanska patentið út, sum Trondur Sørensen hevur fingið

fram so hvørt sett verður. Ætlanin hevur verið at fáa eina Mustad-egningarmaskinu, men nú heldur Tróndur seg klára hetta sjálvur. Hann hevur útviklað ein automtiskan egnara eisini. Annars eru fleiri aðrar egningarmaskinur á marknaðinum, sum rigga væl. Tróndur leggur afturat, at tað er einki til hindurs fyri at samarbeiða við Mustad um henda partin av skipanini. Tað fer so tíðin at vísa. Sjálvur heldur Tróndur ikki at hetta er nakar trupulleiki.

Bøta um umstøðurnar hjá útróðrinum

Sjálvur heldur Tróndur, at tað er sera umráðandi, at okkurt verður gjørt fyri at bøta um umstøðurnar hjá útróðrinum, sum hann metir vera komnan á deyðastrá. Við nýggju clips-linuskipanini verður møguleiki at menna hesa vinnu aftur og geva henni tann týdning, sum hon hevur uppiborið.

Men umframt sjálva clipsingina, magasinini og aðrar partar av skipanini, so er ætlanin at brúka nylon ella monofilamentlinu. Henda fer at geva heilt aðrar møguleikar, hon verður nakað dýrari, men fer at fiska nógv betur og verður lættari at arbeiða við.

Uppá fyrispurning hvussu nógv nýggja clipslinuskipanin fer at kosta, sigur Tróndur, at hon verður kappingarfør við ta norsku skipanina og væl tað. Harafturat koma so allir fyrimunirnir henda nýggja skipanin hevur, so samanumtikið kunnu tær báðar als ikki samanberast.

Men tað, sum hevur alrastørsta týdningin, er, at við at brúka hesa nýggju clips-linuskipanina ber til hjá monnum at fáa størri inntøku, og tað hevur so aftur við sær, at tað verður lættari at manna útróðrarbátarnar, sum so aftur hava betri møguleika at bera seg. Samanumtikið kann clipslinuskipanin gerast ein sonn kollvelting fyri útróðurin og harvið ein neyðug avbjóðing til okkara fiskivinnu sum heild, nú tosað hevur verið um, at tað er útróðrarfiskurin, sum gevur mest til samfelagið.

Tað er Kristin Rasmussen, stjórin á skipasmiðjuni hjá Kjølbro, sum stendur fyri sjálvum projektinum hjá Trónda Sørensen. Stovnað er eitt partafelag, sum ber heitið »C-Line« og verður tað hetta felagið, sum skal taka sær av sølu og framleiðslu av clips-linuni.

jan

Anna Katrina í LIST

— Sjáldsom listargrein, hugtakandi myndir





Sjáldsamar fotomyndir pryða í hesum døgum veggirnar í gallarinum List í Vágsbotni.

Anna Katrina Højgaard hevur tikið fotomyndirnar og arbeitt viðari við teimum. Millum annað hevur hon eisini sett lit á summar myndir.

Hendan listargrein er ikki nógv brúkt í Føroyum, og Anna Katrina er ein av teimum fáu, sum fæst við hana.

Framsýningin í gallarinum List er til sera forvitnislig, og listarverkini eru eisini sera hugtakandi og professionelt greidd úr hondum.

Gallari List hevur opið gerandisdagar frá kl. 13 til 17 og leygardag kl. 10 til 12.

Framsýningin er opin til og við 1. september.

Nærvarp Føroya aftur undir sendingar

3. september fara føroyingar í Keypmannahavn aftur undir at senda frá Sokkelund Radio. Fyrsta sendingin er sunnudagin 3. september í tíðarskeiðnum klokkan 13.00 - 15.00, á 98,9 FM bylgjuni.

Hetta er sjeynda árið at føroyingar hava skipað fyri sendingum frá Keypmannahavn og arbeiðsmegin er nú sum frá byrjanini, ung lesandi og fastbúgvandi føroyingar, sum ókeypis leggja orku í hetta arbeiðið.

Ætlanin var at flyta Nærvarpið í leigað høli í Føroyahúsinum, men enn væntar tó teknisk útgerð til, at tað verður veruleiki.

Nærvarpið hevur leigað høllini og higartil eru 55.000 krónur fingnar til vega úr grunnum og ymsum stovnum í Danmark og Føroyum, men enn vænta 40.000 krónur í at gera útvarpsstovuna lidna, siga umboð fyri Nærvarpið við Sosialin.

Upplýst verður annars, at Nærvarpið altið hevur tørv á arbeiðsmegi og tí verður heitt á føroyingar, sum nú fara niður at lesa og arbeiða, at tey eru vælkomin, um tey hava áhuga fyri hesum arbeiði.

Fyrsti redaktiónsfundur verður í Føroyahúsinum sunnudagin 27. september klokkan 16.00 og tá kunnu áhugaði vitja inn á gólvið. Ein av grundunum til at Nærvarpið hevur tørv á betri sendimøguleikum er, at tey føgin vilja gera sendingarnar lidnar í studio, áðrenn tær verða útvarpaðar. Higartil er mesta tilfarið gjørt beinleiðis í útvarpsstovuni í Sokkelund. Fyri at betra um góðskuna og eisini til tess at gera arbeiðið áhugaverdari, vóna tey í Nærvarpinum, at útvarpsstovan í Føroyahúsinum kann takast í nýtslu sum skjótt sum til ber.

Dagny Joensen

Til Egyptalands
14. oktober 1989
Tvær ella triggjar vikur.
Ring nú til
Karl Nolsøe, tlf. 01491339

FØROYA fk -OKKARA HANDIL KEYPSSAMTØKA